## Kvinnur og politikkur

Mikudagin skipar Føroya Val fyri einum fundi í sambandi við kjakið um, at so fáar kvinnur eru uppi í politikki, og hvat kann gerast fyri at fáa fleiri kvinnur upp í politiska arbeiðið. Gestarøðarar á fundinum verða løgtingskvinnurnar Annita á Fríðriksmørk og Lisbeth Petersen, Rósa Samuelsen, borgarstjóri og Kaj Leo Johannesen, floksformaður. Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum og byrjar kl. 19.30.

## Sama veiða - nógv hægri prísir

Sambært Hagtovuni var áleið sama nøgd avreidd fram til oktobur mánað í ár, sum sama mánað í fjør. Men virðið á avreidda fiskinum var 88 miljónir hægri enn í fjør.

Avreidd vórðu sløk 111 túsund tons í ár móti sløkum 110 túsund tonsum í fjør. Her eru tald upp í øll fiskasløg, skeljadýr eins og rogn og livur.

Virðið á avreidda fiskinum var harafturímóti 88 miljónir hægri. Avreitt var fyri eina milljard í ár, afturímóti 918 miljónum í fjør. Vøksturin er sløk 10 prosent, og stendst sjálvsagt av, at prísirnir á flestu fiskasløgum eru uppfarnir. Eitt nú er avreiðingarprísurin á toski, hýsu og upsa millum 1,5 og 2,5 krónur hægri í ár enn í fjør.

# Ætlanin hjá samgonguni at lækka skattin má steðgast

**- Tey vælbjargaðu fáa næstan alt og tey lágløntu fáa næstan onki. Tí má hesin ultra liberali skattapolitikkurin hjá samgonguni steðgast, siga tey stóru fakfeløgini**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Metir samgongan framvegis, at landið hevur ráð at geva skattalættar hesi bæði næstu árini, má lættin latast teimum, ið hava brúk fyri honum og tað eru tey yvir 12.000 verkafólkunum her á landi, ið eru láglønt, sigur Ingeborg Vinther*

- Hesin ultraliberali skattapolitikkurin hjá samgonguni má steðgast.

Tað staðfesta øll tey fimm arbeiðarafeløgini í Føroyum.

Tey hava viðgjørt ætlanina hjá samgonguni at lata skattalætta næsta ár og í 2008.

Niðurstøðan hjá arbeiðarafeløgunum er, at ætlaði skattalættin hesi bæði næstu árini, kann skaða vælferðarstøðið í Føroyum. Og serstakliga kann hann skaða vælferðarstøðið í landinum tey næstu árini.

Saman við fleiri øðrum fakfeløgum, fingu arbeiðarafeløgini høvi at bera síni sjónarmið fram fyri fíggjarnevndina hjá Løgtinginum í gjár.

- Men tíverri var hetta bara upp á kvamsvís, tí vit fingu greitt at vita frá umboðunum hjá samgonguni, at avgerðin var longu tikin

- Tí veit eg ikki, hvat vit vórðu boðsend til, sigur Ingeborg Vinther.

Saman við arbeiðarafeløgunum, vóru eisini umboð fyri Starvsmannafelagið, Føroya Handverkarafelag, felagið hjá sjúkrarøktarafrøðingum og Yrkisfelagið hjá fíggjarstovnum í Føroyum við á fundinum í fíggjarnevndini.

**Vælbjargað fáa alt**

Ingeborg Vinther sigur, at útrokningar hjá arbeiðarafeløgunum vísa, at skattalættin vendir fullkomiliga skeivt, tí tað vera tey við háløntu, sum fáa næstan alt, men tey lágløntu fáa næstan onki.

- Útrokningar vísa, at tann hálønti, sum forvinnur eina millión um árið, fær 11-13 ferðir so høgan skattalætta í 2007 og 2008 sum tann láglønti fær, ið vinnur millum 150.000 - 200.000 krónur um árið.

Serliga vónbrotin eru fakfeløgini av, at tað skal vera javnaðarflokkurin, ið stendur á odda fyri einum so sosialt ójavnum og órættvísum skattalætta, sum tey taka til.

- Javnaðarflokkurin er bygdur á javnaðarhugsjónina og hevur til stavnhald at burturbeina sosialar ójavnar og sosialt órættvísi. Tí eigur Javnaðarflokkurin ikki at stuðla ultraliberala skattapolitikkinum hjá Bárði Nielsen, landsstýrismanni í skattamálum og Fólkaflokkinum, sigur Ingeborg Vinther.

Hon heldur, at meiningin við skattapolitikkinum kann og eigur ikki at vera, at skapa øktan sosialan ójavna millum láglønt verkafólk og háløntar lønmóttakarar.

- Skattapolitikkurin eigur sjálvsagt heldur ikki at úthola vælferðarsamfelagið, leggur hon afturat.

**Kann skaða vælferðarsamfelagið**

Tá ið fakfeløgini vóru í fíggjarnevndini í gjár, fingu tey eisini boðað frá, at hevur landið ráð at geva skattalættar, má samgongan og Javnaðarflokkurin syrgja fyri, at teir venda sosialt rætt.

- Skattapolitikkurin eigur at verða eitt amboð, har syrgt verður fyri, at breiðastu herðarnir bera tyngstu byrðarnar. Skattapolitikkurin eigur at vera soleiðis, at tey við høgu lønunum rinda ein rímiliga høgan skatt at tryggja samhaldsfasta vælferðarsamfelagið Føroyar.

Tí staðfesta fakfeløgini, at skattapolitikkurin hjá samgonguni má steðgast, tí hann hevur til endamáls at geva teimum tann størsta lættan, sum hava minst tørv á honum.

- Skattagrundarlagið má vera á slíkum støði, at landið hevur ráð at menna vælferðina á pensjónsøkinum og øðrum økjum, sum eru afturúrsigld.

Tí er beinanvegin neyðugt at taka av ella hækka lægstu fyritíðarpensjón, tí henda pensjón er alt ov lág og má eftir fátækramarkinum hjá E. S. metast hon metast at vera ein fátækrapensjón, siga fakfeløgini.

Tey staðfesta eisini, at búskaparfrøðingar hava boðað frá, at skattapolitikkurin hjá samgonguni er skaðiligur fyri landsbúskapin.

- Skattalættarnir, sum eru í umbúna, kunnu skaða vælferðarstøðið og serstakliga kunnu teir skaða vælferðarstøðið í framtíðini.

Fakfeløgini vísa á, at búskaparfrøðingar hava mett, at skattalættin kann seta enn meiri ferð á búskapin, hóast ferðin longu er ríkiliga stór. Hann kann føra til príshækkingar og lægri vælferð, tí minni skattapeningur verður at skapa vælferð fyri.

Samstundis vísa teir á, at skattalættin kann ikki skapa meira arbeiði og harvið hægri arbeiðsinntøku til arbeiðandi fólkið, tí allar arbeiðsførar hendur eru í arbeiði frammanundan.

Ingeborg Vinther sigur, at sostatt er onki ið talar fyri, at tað er forsvarligt at lata skattalætta, soleiðis sum samgongan ætlar.

- Men metir samgongan framvegis, at landið hevur ráð at geva skattalættar hesi bæði næstu árini, má lættin latast teimum, ið hava brúk fyri honum og tað eru tey yvir 12.000 verkafólkunum her á landi, ið eru láglønt.

| Ársinntøka | Netto skattalætti 2007 + 2008 | Netto skattalætti 2003 - 2008 |
|---|---|---|
| 100.000 kr. | 330 kr. | 2.080 kr. |
| 150.000 kr. | 855 kr. | 3.030 kr. |
| 200.000 kr. | 980 kr. | 8.405 kr. |
| 550.000 kr. | 9.655 kr. | 22.385 kr. |
| 1.000.000 kr. | 10.780 kr. | 10.780 kr. |

Hendan talvan vísir, hvat ymsir lænarbólkar fáa burturúr skattalættanum, sum samgongan ætlar at fremja tey bæði næstu árini. Útrokningar vísa, at tað eru tey, sum forvinna ímillum 300.000 krónur og 700.000 krónur, sum fáa mest í skattalætta, serliga tey, sum forvinna rundanum eina hálva millión um árið.